tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Postverkið - gísli í politiskari ósemju

Oddagrein

AFTUR ein almennur stovnur er komin í fíggjarligar trupulleikar. Hóast Postverkið ferð eftir ferð hevur gjørt vart við, at verandi gongd kann ikki halda fram, hevur landsstýrið ikki megnað at fremja eina loysn, so Postverk Føroya fær eina framtíð sum ein almennur tænastustovnur.

TAÐ varð greitt fyri fleiri árum síðani, at inntøkugrundarlagið hjá Postverkinum var ov lítið. Men Postverkið er skipað eftir eini lóg, sum setir upp ávísar karmar fyri virksemið hjá Postverkinum. Vøkstur er ikki í tí, sum hevur verið høvuðsgrundarlagið í arbeiðnum hjá Postverkinum. Og sum almennur stovnur fær Postverkið ikki kappast á teimum økjum, har menning er.

TALAN hevur tí verið um annaðhvørt at skipa Postverkið sum eitt alment partafelag ella ein sjálvstøðugan almennan stovn. Men tá leiðslan í Postverkinum ífjør kom við einum tilmæli at skipa Postverkið sum eitt partafelag, setti Postfelagið og Tjóðveldisflokkurin seg ímóti. Hann mælti heldur til at skipa Postfelagið sum sjálvstøðugan stovn.

MEN sambært tí, sum er komið fram seinastu vikuna, er einki hent ávegis hesi loysn. Tað skilst, at stjórin í Post Danmark, sum hevur vitjað her, ikki hevur kunnað mælt til eina slíka loysn. Síðani er ikki meiri hent, hóast postverkstjórin í fleiri skrivum til Vinnumálastýrið hevur gjørt vart við, at verandi gongd kann ikki halda fram. Í síðstu viku boðaði hann frá, at um ikki nakað hendir, fær Postverkið gjaldføristrupulleikar um nakrar mánaðir. Tað merkir, at vit hava ein almennan stovn afturat, sum er um at fara »á heysin«, uttan at landsstýrið hevur verið fyrst fyri at finna eina loysn,ella fremja ta loysnina, sum landsstýrið gjørdi semju um ífjør.

FLESTU eru samd um, at Postverkið helst skal klára seg uttan at fáa pening á fíggjarlógini, men so má Postverkið fáa ein karm at virka í, so tað kann vinna sær tað neyðuga fíggjarliga grundarlagið. Somuleiðis er tvingandi neyðugt, at leiðslan fær møguleika at nútímansgera Postverkið, sum er afturúrsiglt so tað forslær.

FØROYA fólk hevur kra vum at hava eina góða posttænastu, sum er álítandi og sum lúkar tey krøv, sum okkara nútímans samskiftissamfelag setir. Henda setning hevur landsstýrið heldur ikki klárat at fremja í verki. Ístaðin hevur hon latið starvsfólk og postverksstjóra vera gísla í einum politiskum spæli millum landsstýrisflokkarnar. Slíkt kann landsstýrið heldur ikki bjóða fólki. Men líkt er til at harmasøgan heldur fram: Stranferðslan, Heilsuverkið, Sjónvarpið og nú Postverkið. »Vit mugu hava greiðar linjur«, verður helst svarið. Men latið okkum fáa tær.

Sosialurin

Viðmerking:

Múrurin fall ikki bara eitt sindur, Høgni Hoydal

Høgni Hoydal, landsstýrismaður hevur drúgva grein í Sosialinum fríggjadagin við heitinum: »Tað, sum vendir niður, vendir upp.« Hon er ikki bara long, men eisini rættiliga ósamanhangandi, tí vil eg bert gera viðmerkingar til sjálva byrjanina. Restina kann eg koma aftur til.

Høvuðstráðurin í hesi grein er, at einki skil er meira í hesum landinum, tí vit hava eina andstøðu, sum í tíð og úrtíð tekur til orðanna. Eina andstøðu, sum brúkar so ótrúliga orku til at finnast at sitandi samgongu og hennara politisku ætlanum. Ein andstøða, sum enntá dittar sær at fara í donsk bløð við lygisøgum, útspillingum av landsstýrismonnum og ósannindum um politisku ætlan landsstýrisins.

Hetta eru niðurstøður, sum verða gjørdar í einum ella øðrum formi av desperasjón, tí soleiðis hevur sær okkara veruleiki ikki út. Hetta eru beinleiðis skeivar niðurstøður.

Eg vil beinanvegin siga, at eg als ikki skilji Høgna Hoydal og hansara uppfatan av einum demokratiskum samfelag. Tað er altíð hini, sum eru ósaklig, ósonn og sum einki hava skilt. Tað eru altíð hini, sum koma við ræðumyndum, og tað eru altíð hini, sum sláa hann og hansara viðhaldsfólk í høvdið. Tað eru altíð hini, sum grava seg niður í gomlu skotgravirnar.

Sjálvandi var tað best fyri hann og restina av landsstýrinum, um andstøðan ikki hevði tali- og skrivifrælsi, men so skuldi Høgni Hoydal valt sær annað land at búð í, um tað er tað, hann ynskir, og tað slagið av londum finst enn, hóast gomlu Mekka´ini í Tirana, Moskva og Peking eru fallin. Annað er so, at landsstýrismaðurin kanska átti at broytt arbeiðssetningin hjá grundlógarnevndini, tí sum er ganga vit út frá, at eisini andstøðan í framtíðar Føroyum fær tali- og skrivifrælsi.

Síðan vil eg siga, at mær tykir, at landsstýrismaðurin fellur ein órættvísan dóm yvir andstøðuna, tá hann leggur hana undir persónliga útspilling og lygisøgur, um hann við andstøðuna har eisini hugsar um undirritaða. Eg havi ongantíð í mínum politiska arbeiði fórt meg fram við persónligum álopum hvørki henda ella handa vegin. Tað liggur mær so ótrúliga fjart, og gjarna fyllir tann eftir mínum tykki sakligi og politiski parturin meira enn ríkiligt. Harnæst vil eg siga, at eg sjálvandi havi úttalað meg til donsk bløð, treyðugt so í tí støðu eg havi sum fólkatingslimur, og tað ætli eg mær framhaldandi at gera, men eg havi altíð hildið meg til tann innihaldsliga partin. Men eftir øllum at dømu er hetta eisini ovboðið fyri henda sokallaða »demokratiska« landsstýrismannin. Honum dámar enntá at føra seg fram við orðum sum rættarsamfelag og toleransu, men tey hava kanska annan týðning í hansara totalitera hugaheimi.

Neyvan hevur nakar úttalað seg meira til útlendskar fjølmiðlar enn Høgni Hoydal sjálvur, og tað er eisini í lagi við tí, tí hann er jú forsprákarin fram um aðrar fyri loysingini. Hann hevur enntá givið út bók um sína politisku uppfatan á donskum fyri danir. Og í farnu viku sendi hann saman við løgmanni og Helenu Dam á Neystabø faldara út í hvørt heim, har tey enn einaferð mála myndina so ljósareyða av framtíðarvónunum fyri samráðingunum, hóast veruleikin fyri allar føroyingar er ein heilt annar. Og fyri skattgjaldarans pengar. Rættiliga raffinerarð má sigast - vit billa tykkum nakað inn, sum tit eiga at trúgva, og tit gjalda sjálvi fyri tað. Og her í seinastuni hevur Høgni Hoydal eisini megnað at drigið grønlendingar við inn í kjakið, hóast teir sjálvir hava lagt seg eina við ikki at gerast partur av málinum.

Eitt skalt tú so vita, Høgni Hoydal, at tað skal meira enn hasi illsinisglepsini til, fyrr enn andstøðan stingur í sekkin og tegir fyri rest.

Ikki veit eg, tá Høgni Hoydal og samráðingarnevndin aftaná fundin 17. mars vóru komnir í rasshaft av láturliga búskaparliga útspælinum við næstan óavmarkaðari skiftistíð, tá kundi andstøðan knappliga brúkast. Jú, hetta var eitt útspæl hjá Javnaðaraflokkinum, segði Høgni Hoydal í Tíðindaskrivi, sum løgmaður seinni segði einki vita um. Javnaðarflokkurin hevur so ongantíð arbeitt við einari skiftistíð frá millum 50 og 80 ár.

Høgni Hoydal, hvat er tín uppfatan av einum fleirflokkaðari politiskari skipan? Gaman í, var bert talan um eina og somu trúgv, kanska bert tann eina flokkin, so vóru atfinningar frá øðrum ein rár hending, men hjá okkum skilja vit tað sum eina styrki fyri demoktaisku tilgongdina, at øll koma til orðanna.

So, orsakað eg sigi tað, so tykir mær, at tú onkursvegna er komin í klemmu millum eina farna og eina nýggja tíð. Múrurin fall ikki bara eitt sindur, nei hann skrædnaði líka í botn, Høgni Hoydal Lat teir ikki ráðgeva tær um bert at taka ein part av nýggju tíðini við, fyri síðan eisini at varðveita leivdirnar av tí mest ræðuliga, nevniliga tørvandi virðing fyri einari demokratiskari tilgongd, har eisini andstøðan og onnur sleppa framat.

Vit brúka hóast alt ikki skattgjaldarans pening til selja okkara sjónarmið.

Jóannes Eidesgard

Ungmannabólkurin Fokus sýnir leikin [Fikz]

Leikurin [Fikz] er um ung, kærleika, stoffir, vinir og foreldur. Eyðna rýmur heimanífrá og flytur inn hjá sjeikinum Lars. Tey bæði hava tað fínt saman til Petur, ið er pushari og vinmaður Lars, kemur uppímillum. Stoffir byrja at blanda seg inn í lívi hjá Eyðnu, og nógv broytist. Hvat síðani hendur fara vit ikki at avdúka her.

Leikurin er gjørdur av ungum til ung. Undir leikinum standa tey í Fokus sjálvi fyri ljóð og ljós skifti.

Í seinnu helvt av december 1999 fóru tvær gentur, frá Barnasjónleikarafelagnum 'Dramaverkstaðnum' í Havn, undir ætlanina at stovna ein sjónleikarbólk. Ein teirra var komin fram á tvær lýsingar inni á Internetinum um tvær sera spennandi sjónleikarastevnur í Íslandi og Danmark summarið 2000, og setti seg síðani beinavegin í samband við vinkonu sína. Tann 6. januar var bólkurin stovnaður, og var tá komin uppá fimm leikarar. Høli at venja í skuldi finnast, og tá Dramaverkstaðið í Havn, var bjóða teimun, tóku tey av við gleði. Tá hugskot um evni var komi fram, var fari undir at improvisera seg fram til ein leik. Fyri at fáa tey ymsu improviseraðu brotini tengd saman, var fari undir, saman við Hjørdis Johansen, at seta saman, fylla út og skriva endaliga leikritið. Fikz er fyrsti leikurin bólkurin framførir.

Bólkurin er nú komin undir Havnar Sjónleikarafelag. Í juni og juli fer Fokus so avstað til Íslands og Danmark, har tey skulu framføra leikin.

Sýningar í sjónleikarhúsinum í Havn:

Týsdagin 16.05.00 kl. 20.00

Mikudagin 17.05.00 kl. 20.00

Í Losjuni í Gøtu:

Fríggjadagin 19.05.00 kl. 20.00.

†

Kunngjørt verður at góði pápi, verfaðir og abbi okkara

TÓRUR SJÓFØDDI AV VOLLANUM,
Saltangará

andaðist í heiminum fríggjadagin 12. mai 2000, 58 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Berøa, Saltangará, 16. mai kl.13.00

Familjunnar vegna

William, Petur, Jørgin, Birgir og Sigrun

Oops!....I did it again
HEIMSPREMIERA

BRITNEY SPEARS
NÝGGJA FLØGAN

Nýggja fløgan hjá BRITNEY SPEARS kemur út í allari verðini samstundis!
- sjálvandi eisini í 3'aranum!

"Oops!...I did it again" - kr. 159,-

3arin
SMS · Tel. 353535 · Fax 353536
E-mail: tryarin@post.olivant.fo